# HOFF STOFF

## Innbjóðing til tey kongaligu

**Tvær gentur úr kommunuskúlanum vónaðu mánadagin at fáa kongaliga vitjan. Men mongum brestur ætlan, og innbjóðingin var týsmorgunin funnin á vegnum**

HOFF STOFF
*eydna@sosialurin.fo*

Sporini eftir kongaligu vitjanina síggjast framvegis í Havnargøtum. Týskvøldið fann undirritaða eina heilsan frá mánadegnum liggjandi í Tórsgøtu.

Talan er um eina heilsan til regentparið og eina til krúnprinsaparið frá tveimum gentum í kommunuskúlanum, sum vóru komnar oman í býin at flagga fyri teimum.

Men á skrædda pappírsflagginum er eisini ein innbjóðing. Innbjóðingin ljóðar stutt og greitt »Kom og besøg os«.

Ivasamt er, um kongsfamiljan hevur sæð flaggið. Í øllum førum hava tey ikki havt stundir at kroyst eina eyka vitjan inn í strømmu tímatalvuna.

Men hervið er innbjóðingin farin víðari, og møguliga fer kongshúsið at umhugsa Lív og Olgu Mariu næstu ferð tey koma hendanvegin.




*Til Magrete og Hendrek fra Lív og Olga Maria i 4.b i kumuneskulen*

*Og til Mary og fredrek fra Lív. t og olga Maria i 4.b. i kumeneskulen Kom og besøg os*

## Bilførararnir hjá Margrethu



*Frá vinstru síggjast: Hans Jákup Jensen, Frank Petersen, John Martin Olsen, Fríðrikur Bláhamar, Tróndur Fuglø og Knud Bjørk*

BILFØRARAR
*eydna@sosialurin,*
*mynd Bárður Lydersen*

Teir, ið koyrdu drotningina og fylgi hennara í Havn, søgdu allir, at hetta var ein spennandi uppgáva.

– Tað er eitt sindur øðrvísi at koyra við teimum kongaligu, í mun til at koyra við øðrum. Men tey eru bara fitt, og vit halda, at hetta er eitt gott arbeiði. Vit eru glaðir fyri at kunna hjálpa til, søgdu teir eftir seinasta steðg í Williams húsi mánadagin.

## Royalar etikettir

Tað er ikki sørt, at nógv verður gjørt burturúr royalu døgurðunum, sum verða hildnir kring landið í hesum døgum.

Týsdagin var tað Tvøroyrar Býráð, sum var vertur, og millum tað, sum var at fáa, vóru eisini føroyskar øl á skránni.

Hjá Restorff's í Havn høvdu tey til høvi prýtt fløskurnar við serstøkum etikettum, har ávíkavist drotninga- og krúnprinsahjúnini eru avmyndað.

Tað er Repro-z í Havn, sum hevur sniðgivið serligu etikettunum, sum ikki kunnu sigast annað enn at vera snotuligar.

**-jm**

